## Vantandi tilbúgving

Hvat hevði hent, um eitt stórt ferðamannaskip við fleiri túsund ferðafólkum umborð fór á land ella rendi á eitt ísfjall í Grønlandi? Tann spurningin hevur tinglimurin Marie Fleischer sett landsstýrinum. Hon vísir millum annað á ferðamannaskipið Grand Princess, sum var í Grønlandi í summar við 3.600 ferðafólkum. Marie Fleicher sigur, at tyrlan hjá sjóverjuni tekur bara seks fólk, og at Vædderen hevur bara pláss fyri 200 ella 300 fólkum.



## Avhildin forseti

Næsta summar hevur íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, verið forseti í tólv ár, men hóast bara eitt hálvt ár er eftir av hesari setuni, hevur hann ikki boðað frá, um hann stillar uppaftur. Men tað halda flestu íslendingar, at hann eigur at gera. Í einari spurnarkanning hjá Støð 2 í gjár svaraðu tey flestu, at forsetin eigur at stilla uppaftur, og tey flestu vóru á einum máli um, at Ólafur Ragnar Grímsson hevur staðið seg væl í embætinum.

# Sjúklingatryggingarlóg virkar ikki

**Føroyskir sjúklingar skulu ígjøgnum tungt og drúgt rættarmál, um teir vilja hava endurgjald fyri viðgerðarfeilir. Hetta hóast ein sjúkratryggingarlóg var sett í gildi í 1999 júst til at hjálpa slíkum sjúklingum**

HEILSA

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í Danmark eru tríggjar lógir, sum tryggja, at sjúklingar fáa endugjald um nakar feilur hendir undir viðgerð. Hetta eru ríkislógir, men Løgtingið hevur bara samtykt at seta eina av hesum í gildi í Føroyum.

Løgtingið setti í 1999 Sjú klingatryggingarlógina í gildi. Hetta var, tá Helena Dam á Neystabø var landsstýriskvinna í Almanna- og heilsumálaráðnum. Men hendan lógin hevði onga meining, um ikki endurgjaldsábyrgdarlógin ikki eisini varð samtykt.

Endugjaldsábyrgdarlógin er ikki heilsumál, men lógarmál, og var tað tí Høgni Hoydal, sum landsstýrismaður í løgmálum, sum hevði ábyrgd at fáa hesa lóg í Løgtingi.

Helena Dam á Neystabø sigur við Sosialin, at hon ivaðist ikki í, at lógin um endurgjald beinanvegin fór at koma fyri tingið eisini, og hon harmast, at lógin um sjúklingatrygd framvegis er óvirkin.



*Sverri Nilssen misti annan armin, tí ein lækni ikki gjørdi sítt arbeiði nóg væl. Hetta var fyri tveimum árum síðani niðurstøðan hjá einari samdari sjúklingakærunevnd. Men av tí at endurgjaldstryggingarlógin ikki er komin í gildi í Føroyum, verður hann uttan iva noyddur ígjøgnum eina tunga og drúgva rættarsak, um hann skal gera sær nakrar vónir um endurgjald*

### Ikki høga raðfesting

Endurgjaldsábyrgdarlógin hevur verið løgd fram í Løgtinginum tríggjar ferðir, í 1998, 2002 og 2003. Fyrstu ferð valdi Landsstýrismaðurin sjálvur at taka uppskotið aftur, tí vanlukkutryggingarlóginskuldi leggjast fram saman við endurgjaldslógini. Í 2002 kom eitt val í vegin, og í 2003 náddi Løgtingið ikki at viðgera málið, áðrenn tingsetan endaði. Síðani hevur málið ikki verið á tingborði.

Úrslitið er, at Løgtingið fyri 9 árum síðani samtykti eina lóg, sum enn ikki er sett í gildi, tí gildiskoman er treytað av, at Endurgjaldsábyrgdarlógin somuleiðis verður sett í gildi.

### Ikki við í samgonguáliti

Í sitandi landstýrið hava tríggir landstýrismenn havt ábyrgd av økinum, Jógvan við Keldu, Jacob Vestergaard og nú til seinast Heðin Zachariassen. Eftir at Tjóðveldisflokkurin fór í andstøðu hava fleiri fyrispurningar verið frá flokkinum um manglandi endurg jaldstryggingarlógina.

Í apríl 2005 hevði Finnur Helmsdal skrivligan fyrispurning til táverandi landsstýrismann í innlendismálum um endugjaldsábyrgdar lógina. Landstýrismaðurin varð spurdur, hví lógin ikki var sett í gildi í Føroyum, og um ætlanir vóru um at fáa Løgtingið at samtykkja, at lógin kundi setast í gildi í Føroyum.

Finnur Helmsdal sigur í viðmerking til fyrispurningin:

- Avleiðingarnar av drálanini ella forsømilsinum eru rættiliga álvarsligar fyri tey, sum bíða eftir, at Endurgjaldsábyrgdarlógin verður sett í gildi í Føroyum.

Víðari sigur løgtingslimurin, at tað vit hava hópin av dømum um føroyskar sjúklingar og avvarðandi teirra, sum kenna sviðan av, at Heilsuverkið ikki skal standa til svars fyri sínar gerðir í sama mun, sum heilsuverkini í londunum kring okkum.

Jógvan við Keldu sigur í sínum svari, at Landsstýrið ikki hevur viðgjørt málið, og endurgjaldslógin ikki er eitt av teimum málum, ið er nevnt í samgonguskjalinum. Men hann leggur tó afturat, at hetta ikki merkir, at landsstýrið ikki ætlar sær at viðgera málið.

- Men av tí at landsstýrið ikki hevði viðgjørt hetta mál, fekk eg tí ikki svarað spurninginum um, hvørt eg havi ætlanir um at biðja Løgtingið um at samtykkja, at lógin kann setast í gildi fyri Føroyar, svaraði Jógvan við Keldu í 2005.

### Lógin sum ongantíð kom

Í 2006 og 2007 setur Finnur Helmsdal aftur munnligar fyrispurningar um sama mál til táverandi landsstýrismann í innlendismálum, Jacob Vestergaard. Í 2006 lovar landsstýrismaðurin at taka málið upp, men eitt ár seinni er einki hent, og sami løgtingslimur setur nýggjan munnligan fyrispurning.

Í September 2007 sigur Jacob Vestergaard, sigur seg vera samdan við spyrjaran, at lógin langt síðani átti at vera sett í gildi.

Av tí at danska lógin er broytt hesi seinastu mongu árini, var neyðugt at biðja um eitt nýtt ríkislógartilmæli, og landsstýrismaðurin upplýsir, at ríkismyndugleikar hava upplýst at lógin verður send innlendis málaráðnum í næstum.

- Miðað verður eftir, at málið verður lagt fyri tingið, soleiðis at lógin kann koma í gildi 1. januar 2008, sigur landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard.

Men ríkislógartilmæli kom ongantíð í tingið.

### Viðmerking hjá Finni Helmsdal í samband við fyrispurning um endurgjaldsábyrgdarlógina í 2005

At lógin um endurgjaldsábyrgd ikki er sett í gildi ger, at føroyingurin als ikki hevur somu trygd ella sama rætt sum aðrir norðbúgvar, hetta tá tað snýr seg um sjúklingatrygd. Vit ætla okkum at vera fremstir og bestir, men vit hugsa ikki um at veita okkara fólki mest grunnleggjandi rættartrygdirnar.

Drálanin av lógini hevur kosta mongun nógv. Nógv hava mist fitt av peningi, men nógv hava eisini staðið í óhepnum og mannminkandi støðum, sum hava kostað stríð, tíð og vónloysiskenslur.

Tað er helst ikki so løgið, at føroyingurin kærir nógv sjáldnari enn aðrir norðbúgvar.

### Fimm ára fyrningarfreist fyri kærur

John Eysturoy segði í viðmerking til málið hjá Sverra Nilssen í Sosialinum í gjár, at fyrningarfreistin í slíkum málum er tvey ár. Men sambært heimasíðuni hjá Syghusvæsenets Patientklagenævn, er fyrningarfreistin í spurningum um viðgerðarfeilir fimm ár. Tá talan er um medisin feilir er fyrningarfreistin trý ár. Hetta vil siga, at Sverri Nilssen, sum misti ein arm orsakað av læknafeili, kann saksøkja Suðuroyðar Sjúkrahús og yvirlæknan upp til fimm ár eftir sjúklingakærunevndin kom við sínari niðurstøðu. Tó kann ikki kærast, um tíggju ár eru farin síðani feilurin sjálvur fór framm.

## FAKTA

**Landsstýrismenn við ábyrgd fyri, at endurgjaldslógin ikki er løgd fyri tingið**

Høgni Hoydal 1998-2003
Jógvan við Keldu 2004-2005
Jacob Vestergaard 2005-2007
Heðin Zachariasen 2007